miðvikan
Nr. 14 • 21. jan. 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

Andreas Djurhuus 100 ár:

# Koyrdi bil til hann var 98

**Í morgin 22. januar verður Andreas Djurhuus, vanliga kallaður Diurin, 100 ár. Vit hava verið inni á gólvinum hjá honum. Ikki sæst stórvegis av aldri á hesum gamla**

Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Vit høvdu í ólavsøkublaðnum í 2007 eina samrøðu við Diin. Hetta var í samband við, at hann hevði koyrt bil, til hann var 98 ára gamal. Vit hava so ikki enn hoyrt um nakran líka gamlan bilførara. Bert hetta sigur, at her er talan er um ein knassa.

Tað er stuttligt at práta við Diin. Hann minnist ikki bert tað gamla. Hann minnist eisini tað, sum hendi í gjár, og hann fylgir sera væl við í tí, sum gongur fyri seg í samfelagnum.

Vit fara at tríva nakað aftur í greinina frá 2007 og koma annars inn á onnur viðurskifti, sum Diurin kann greiða frá. Ikki minst um pápan, ættina, heimbygdina og annars um hansara virksemi í sínum langa lívi.

Diurin er sera birgur. Eyguni eru nakað farin, men hann klárar enn at lesa nakað. Hann lesur millum annað við áhuga Miðvikuna í Sosialinum. Tí er tað ikki meira enn rímiligt, at henda Miðvikan kemur at snúgva seg um hann.

Diurin er einsamallur í húsi og klárar stórt sæð seg sjálvan. Hendan eina dagin bjóðaða hann nátturða, og hóast honum stóð í boði at fáa versonin at vaska upp, so vildi hann ikki vita av tí. Tað kundi hann saktans klára sjálvur!

Enn fer hann eisini framvegis eitt legg útum í havan at taka eina hond í. Seinasta summar málaði hann stakittið! Hann ger sær sjálvum døgurða. Men so ferðast hann eisini til døturnar í Trongisvági og Klaksvík.

## Lávus var sjómaður

Diurin er sonur Olavus í Skemmuni og Elsebeth Súsannu av Nesi í Vági.

Lávus var føddur 21. jul 1867. Pápin Johan Djurhuus, óðalsmaður við Á, var slektaður av Nesi í Eysturoynni. Hann var av próstaættini hjá Andrias Djurhuus.

Lávus fór til skips í 1887 við Trangisvaag hjá Suderø Handelsforening.

Lávus førdi Trangiswaag í 1893, áðrenn hann sjálvur hevði lært til skipara.

Lávus tók skiparaprógv í 1894 hjá Jens í Dali. Hetta var fyrsta árið, skiparaprógv var tikið í Føroyum.

Hann førdi Jeanette í 1894 og 1895. Lávus var við til at keypa Sildberan í 1895 úr Grimsby. Hann kom í nevndina saman við Jákup Kjelnæs, sum arbeiddi nógv ár hjá T.F. Thomsen, og sum fyrr er umrøddur í røðini Hendur ið Sleptu. Lávus førdi Sildberan fra 1895 til 1897.

Hann førdi Robert Miller 1898-1903. Lagnunar speisemi gjørdi, at sonur hansara seinni gekk burtur við sama skipi.

Árini 1903-1905 førdi Lávus Sunbeam. Í 1916 førdi hann deksbátin Jane & William fram til 1932, undantikið trý ár.

Tá legðist hann uppi og fór at handla.

Ólavus og konan Elsba Sanna vóru eisini millum tey fyrstu í brøðrasamkomuni í Porkeri, sum var ein tann fyrsta í Føroyum. Hann var eisini ein av stuðlunum at fáa fyrsta møtisalin hjá samkomuni bygdan. Hann átti part í økinum, sum varð latið til salin at byggja á.

## Hevði Dias á Heyggi við fyrsta túrin

Lávus var mammubeiggi Dias á Heyggi, sum eisini var úr Porkeri, og Dias fór 14 ára gamal til skips í 1894 við Jeanette, har Lávus var skipari.



*Diurin avmyndaður mánadagin. Málningin til høgru av Vágseiði hevur systkinabarnið William Smith málað*





*Elsba Sanna og Lávus, foreldrini hjá Diinum*

Teir vóru einir fýra fjúrtan ára gamlir dreingir úr Porkeri við. Reiðarin Jógvan Mortensen helt fólkið vera nakað ungt. Men Lávus segði, at teir skuldu ikki verða sviknir av hesum dreingjum. Teir vóru vanir at rógva út við báti og vóru stakmenn at fiska. Tað var eisini skjótt, at Dias gjørdist av bestu fiskimonnum og aftur seinni gjørdist hann ein av fremstu rokskiparum í landinum. Hann fekk eisini skip og virksemi á landi.

## Pápin hevði úthandil

Tey vóru átta systkin hjá Diinum. Men bert tvey blivu gomul. Umframt Diin sjálvan var tað systirin Sunneva, sum giftist við Peter Sørensen í Porkeri. Beiggin Johan gjørdist bert 36 ára gamal.

Fleiri systkin doyðu sum smá. Tá var ikki sum nú at fáa læknahjálp. Lækni var bert á Tvøroyri, og tað kundi ofta blíva ov seint at bíða eftir honum.

Lávus fór at handla fyri Jaspur á Løghamri í Vági og síðan fyri seg sjálvan. Ein handil var ikki bert ein handil. Hann tók eisini móti fiski. Handlarnir í Porkeri tóku nógvan saltfisk til turkingar, sum gav nógv arbeiði í bygdini.